# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Leivur Kjærbo**, fyrrverðandi keypmaður í Sumba, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi hósdagin, 85 ára gamal.

Góða kona, mamma, vermamma, omma og systir okkara

**Elsa Krog**
**Esbjerg**
fødd Olsen, úr Vestmanna

andaðist í Esbjerg 26. mars, 71 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Jesne Kirke mikudag 31. mars kl. 13.30.

*Vegna tey avvarðandi*
**Bent, Ejgil, Gert og Torben við familju**

## MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. apríl verði eg 60 ár, føðingardagsveitslan verður hildin í Skálanum í Klaksvík, leygardagin, 10. apríl kl. 19. Tey sum ynskja at gleða meg við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin at boða frá við at ringja ella senda sms til telefon 211988, ella við t-posti til isak@football.fo helst áðrenn 5. apríl. Heilsan Ísak Mikladal, Klaksvík.

**Silvurbrúdleyp**
Leygardagin 3. apríl hava Katrin og Ingimund Hansen Fuglafjørður silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18 fyri innbodnum.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 17. apríl hava Helga og Jørgin Gleðisheygg Nes, Gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík, kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá innan 8. apríl á tlf. 447160 ella 270876

**Dagurin**
29. mars. Jónas, deyður umleið ár 326. Tikin av døgum í Persiu. Navnið merkir dúgva ella er kanska ein stuttur formur av Jóannes.
*Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008*

# Drotning Ingrid 100 ár



*Drotning Ingrid (1910-2000)*



*Drotning Ingrid og Fríðrikur 9. sum ung*

Sunnudagin 28. mars vóru 100 ár síðan drotning Ingrid var fødd.

Drotning Ingrid varð fødd sum svensk prinsessa, dóttir Gustav 6. kong í Svøríki og Margarethu krúnprinsessu.

Ingrid giftist Kronprins Frederik (IX) av Danmark tann 26. mai 1935 í Stokholm, og gjørdist drotning í Danmark í 1947, tá hann gjørdist danskur kongur. Tey fingu tríggjar døtur: Margrethe, sum er drotning í dag, Benedikte og Anne-Marie.

Fríðrikur 9. var føddur 11. mars 1899 og andaðist andaðist 14. januar 1972, 72 ára gamal.

Ingrid legði t.d. grundarsteinin til Drotning Ingridar barnagarð í Jóannesar Paturssonargøta í Havn í 1949. Drotning Ingrid andaðist 7. november 2000, 90 ára gomul.

**-red**

Fyri 20 árum síðan:

# 1100 fólk stuðlaðu leguhúsinum

Sosialurin skrivar tann 28. mars 1990, at 1100 fólk lata pening til leguhúsið, sum Hin Kristiliga Heimamissiónin letur byggja í Nesvík. Húsið, sum er mett til at kosta millum 25 og 27 milliónir krónur at byggja, verður eftir ætlan liðugt næsta ár. Ásbjørn Joensen, landsskrivari hjá heimamissiónini og limur í bygginevndini fyri húsið sigur, at umleið 1100 fólk flyta pening fast hvønn mánað til leguhúsið.

Blaðið skrivar eisini, at vit hava sjálvi skyldina av ódnunum, ið hava verið seinastu tíðina, sum eftir øllum at døma koma av dálking.

Eisini skrivar blaðið, at Heri Smith hevur eina framsýning við blýantstekningum í Smiðjuni í Lítluvík. Útlit eru at Klaksvíkar Kommuna heilt skjótt kann fara undir at byggja læknamiðstøð í miðbýnum, og nýggja Sløkkiliðsstøðin í Sundalagnum hevur havt sína fyrstu stóru uppgávu, tá eldur kom í ein sethús í Hvalvík.

*Kelda: Sosialurin 28. mars 1990*

**-red**



tíðindablaðið
sosialurin

Skálkurin
Um arkitektur og design

1100 fólk lata pengar til leguhúsið

Tvøroyrar Flakavirki verður

Sín egna fiskasøla

Dálking er ein orsøk til illveðrið

Einki fingið at vita